Starvslýsing

Heimatænastan

## Røktarstarvsfólk til Heimatænastuna í Suðurstreymoy

Til Heimatænstuna í Suðurstreymoy sóknast vit eftir tveimum heilsuhjálparum at starvast í skiftandi vaktum bæði úti í Heimatænastuni og inni á eldrasambýlunum, ið hoyra til økið, 35 tímar um vikuna.

Harumframt verður søkt eftir heilsuhjálpara ella heilsurøktara til gerontopsykiatriska sambýlið 32 tímar um vikuna.

Starvsfólk við viðkomandi útbúgving hava fyrimun.

**Setanartreytir:**
Talan er um størv innan Nærverkið við fyribils tænastustaði í Heimatænastuni Øki 1. Løn sambært sáttmála millum Fíggjamálaráðið og avvarðandi yrkisfelag. Meiri fæst at vita um størvini við at venda sær til økisleiðaran, Metu av Fløtum, á telefon 31 72 49.

**Umsókn:**
Umsókn við prógvi og upplýsingum um arbeiðsroyndir skal sendast til:
Heimarøktin Suðurstreymoy
Skálatrøð 14
FO 100 Tórshavn
Stílað: Meta av Fløtum, økisleiðari

**Umsóknarfreist: 21. mai 2007**

**Les meira á www.naerverk.fo / leys størv**

Nærverkið kemur út til borgaran at veita tænastur, ið fevna um eitt nú stuðul, tilboð til borgarar við serligum tørvi og tænastur til barnafamiljur og eldri. Nærverkið er sjálvstøðugur stovnur undir Almanna- og heilsumálaráðnum. Umframt Meginskrivstovuna, ið hevur yvirskipaðu leiðsluna, eru fýra deildir: Heimatænastan, Trivnaðartænastan, Stuðulstænastan og Barnatænastan. Nærverkið leggur áherðslu á nærleika, umsorgan og professionalismu í øllum lutum. Umleið 1400 fólk starvast í Nærverkinum.

NÆRVERKIÐ

Meginskrivstovan, Postsmoga 3037, 110 Tórshavn, Tel 30 40 20, Faks 30 40 10, meginskrivstovan@naerverk.fo

**www.naerverk.fo**




FØROYA HANDILSSKÚLI

## Føroya Handilsskúli søkir eftir lærarum

**Treytað av ætlaðum virksemi søkir Føroya Handilsskúli eftir lærarum til HH og FHS í Tórshavn frá 1. august 2007. Talan er um tíðaravmarkað støv skúlaárið 2007/2008, men hevur umsøkjari útbúgving í lærugreinum, sum hóska til tørv skúlans, kann talan tó verða um fast starv.**

**Hesir tímar eru leysir at søkja (tímatølini standa í klombrum og eru vegleiðandi):**

Altjóða búskapur (5 t/v), Danskt A (3-6 t/v), Dekoratión (3-6 t/v), Enskt C, B (4-8 t/v), Fyriskipan A (4 t/v), Føroyskt C (4-8 t/v), Sálarfrøði C (4 t/v), Støddfrøði C (5-10 t/v), Sølubúskapur C, B (8-12 t/v), Vinnulívsrættur C (9 t/v), Virkisbúskapur C, B (8-12 t/v).

**Arbeiðsuppgávur:**
- undirvísa í viðkomandi lærugreinum
- leggja til rættis undirvísingargongdir
- luttaka í toymisarbeiði
- vera við í ráðlegging skúlans
- luttaka í verkætlanum, sum skúlin skipar fyri

**Vit vænta, at tú:**
- hevur viðkomandi útbúgving á kandidatstigi ella aðra hægri útbúgving saman við serfrøðingavitan til lærugreinir á A- og B-stigi.
- hevur viðkomandi útbúgving á bachelor-stigi ella aðra hægri útbúgving saman við serfrøðingavitan til lærugreinir á C-stigi.
- hevur áhuga í undirvísing
- dugir væl at samstarva og samskifta
- vilt vera við at menna skúlan
- ikki ræðist nýggjar avbjóðingar

**Vit kunnu m.a. bjóða:**
- eitt fakligt mennandi læringsumhvørvi
- eftirútbúgvingarmøguleikar
- góðar arbeiðsumstøður
- ein spennandi og lívligan gerandisdag

**Setanarkor til fast starv:**
Fyrstu tvey árini verða roknað sum royndartíð. Lærarar, sum settir verða í fast starv, mugu vera til reiðar at fara undir kravda námsfrøðilga útbúgving skjótast gjørligt. Eisini hava teir skyldu at undirvísa í teimum lærugreinum, teir hava førleika til.

**Løn:**
Lærarar verða løntir eftir sáttmála millum Lærarafelag Handilsskúlans og Fíggjarmálaráðið.

**Umsókn:**
Umsóknin skal stílast til Føroya Handilsskúla og sendast til Føroya Handilsskúla, Marknagilsvegur 77, Postsmoga 177, 110 Tórshavn. Umsóknirnar skulu vera skúlanum í hendi **í seinasta lagi 14. mai 2007**. Umsóknarblað fæst á skúlanum ella á heimasíðu skúlans www.fh.fo.

Nærri upplýsingar um størvini kunnu fáast við at venda sær til Olav Absalonsen ella Sonju Petersen á telefon 317177, teldupostur: **oa@hsh.fo** ella **sp@hsh.fo**.

*Á Føroya Handilsskúla ganga umleið 200 næmingar á Hægri Handilsskúla (HH) og 200 á Fyrisiting, Handli og skrivstovu (FHS). Í Havn starvast um 35 og á Kambsdali 20 lærarar. Umframt HH og FHS skipar Føroya Handilsskúli fyri kvøldskúla og framhaldsútbúgvingum, so sum HD og akademimerkonom.*

**FØROYA HANDILSSKÚLI**
Postsmoga 177 · 110 Tórshavn · Tel 317177 · Telefax 313374
**Heimasíða skúlans: www.fh.fo**

TEAM85